Álit

í

løgtingsmáli nr. 42/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll (Nýggj vørunummur fyri f-gass og ávísar rættingar í toll- og vøruskránni)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 7. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 13., 16. og 30. november og 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Reiðarafelagið, Vinnuhúsið, Búskaparráðið, Landsbankan, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, seinnu ferð saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Toll- og vøruskráin er uppslagsverk, ið vísir toll og annað avgjald á vøru, ið verður keypt úr útlondum. Við lógaruppskotinum verða nýggj vørunummur stovnað fyri sonevnd f-gass í sambandi við áseting av gjøldum á innflutning av f-gassi. Haraftrat verður eitt vørunummar strikað í toll- og vøruskránni.

Í galdandi toll- og vøruskrá eru ikki ásett vørunummur ella tollur fyri f-gass. Tí er neyðugt at stovna nýggj vørunummur í sambandi við f-gass, sum við øðrum løgtingsmáli nr. 41/2023 verða áløgd avgjald við innflutning.

Annars verður víst til meirilutaálitið í løgtingsmáli nr. 41/2023.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í samband við, at ætlanin er at leggja nýggj avgjøld á F-gass, má toll- og vøruskráin dagførast, so vørunummur fyri vørur við F-gassi eisini eru í skránni.

Í hesum sambandi skal minnilutin vísa til minnilutaálitið í løgtingsmáli nr. 41/2023.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	